Nr. 7 November 2015 68. árið

# KIRKJULIGT MISSIÓNSBLAÐ



## Kirkjufaðirin Augustin segði: “Guð, tú hevur skapt okkum til tín, og hjarta okkara er ótrygt og óttafult, inntil tað finnur hvílu í tær”.

Vit lesa í evangeliinum um ein mann, sum kom til Jesus og spurdi, hvat hann kundi gera fyri at fáa ævigt lív. Tá ið Jesus svarar honum, at hann skal halda boðini, so sigur hann, at tað hevur hann gjørt. Men tá ið Jesus so sigur, at hann skal fara at selja alt, sum hann eigur, tá verður verri. Tað kennir maðurin seg ikki føran fyri at gera. Og hann fer tí keddur avstað frá Jesusi.

Maðurin vildi ikki geva ríkidømið frá sær, men samstundis visti hann, at ríkidømi var ikki nokk. Hann hevði eina tráðan, ein longsul eftir onkrum meira, onkrum, sum kundi geva lívinum innihald, geva lívinum eina hægri og djúpri meining. Tì kom hann til Jesus.

Hjá okkum er ikki so torført at samanbera okkum við henda mann. Tí menniskja anno 2015 leitar eisini eftir meining og innihaldi í lívinum. Leitar eftir tí æviga.

Hví eru vit her? Hvør er meiningin við lívinum? Eru vit bara sett á jørðina av tilvild, og tá ið vit einaferð doyggja, so verða vit til mold, og so er úti við okkum. So er einki eftir.

Hví liggur so ein tráan í okkum eftir onkrum meira? Eftir eini hægri meining?

Er tað ikki júst hesin spurningur, vit mugu fáa svaraðan fyri at kunna liva eitt innihaldsríkt lív?

Hava vit ikki øll tørv á at vita, at vit eru ikki sett á jørðina at liva av tilvild. Guðs orð lærir okkum, at hann hevur eina fullfíggjaða ætlan

við okkum. Vit eru ikki bara eitt tal i statistikkinum, og tá ið vit eru farin, eru vit ikki bara burt, nei, vit eru partur av tí æviga.

Maðurin, sum eg byrjaði at siga frá um, fór til Jesus við síni tráðan eftir onkur meira? Hvar leita vit?

Vit fara mangan á útsølu í materialsmuni.

Vit fylla lívið við tingum, nýggjum sofum, nýggjum bili ella uttanlandsferð. Hetta halda vit fer at hava við sær, at vit verða nøgd og glað. Men tá ið sofurnar eru slitnar, tá ið bilurin hevur fingið sína fyrstu skøvu, og tá ið vit eru komin heim aftur av uttanlandsferðini, er lívið so vorðið meir innihaldsríkt, ella venda vit so bara aftur til den grå hverdag?

Tað er ikki vorðið betri ella lættari at verða menniskja av, at tilboðini í dag eru nógv og stór-. Tí krøvini eru vaksin samsvarandi. Bæði á arbeiðsplássinum, men eisini í familjuni eru krøvini stór. Ov stór, kundi man heldur sagt. Tí Strongd er vorðin tann nýggja heimsfarsóttin. Strongd, sum kemur av, at man pressar seg sjálvan til tað ydersta. Hví, jú ti man leitar eftir onkrum. Vit koyra við 100 km ferð um tíman gjøgnum lívið bara fyri at vera uptodate, soleiðis nøkunlunda. Men hví? Hví er tað vit renna ella hvørjum renna vit eftir? Er tað tí vit halda, at hetta vit renna eftir, fer at geva okkum eitt meiri eydnuríkt lív?

Tað stóð at lesa í einum tíðarriti herfyri at menniskja í dag er andaliga søkjandi. Og vit kunnu siga Tíbetur. Tìbetur eru fólk fara at hugsa um, at vit øll hava ein andaliga tørv, sum má og skal verða nøktaður, fyri at kunna livað eitt innihaldsríkt lív.

Vit hava øll tørv á onkrum, sum kann geva okkum eina kenslu av friði og tryggleika. Geva okkum kenslu av at alt er ikki bara tilvild.

Vit leita á netinum, í vikubløðum, í sjónvarpsrásum og á ráðstevnum eftir onkrum, sum kann stilla tað friðleysa sinni, sum heimurin hevur skapt. Vit ganga til yoga, meditatión, avstressing, avslapping, massagu og hvat veit eg.

Men frið og innihald finna vit ikki. Hví? Jú, tí vit leita á skeivum staði. Tann sanna friðin og tað sanna innihaldið finna vit á einum staði, ella kundi kanska heldur sagt hjá einum persóni, og tað er hjá Jesusi. Hjá tí skapara, sum av fyrstan tíð blásti sín anda í menniskja, hjá honum og einans hjá honum fáa vit allan tørv okkara nøktaðan. Hjá honum finna vit hvílu.

Trúgvin um tað æviga lívið førir við sær, at lív okkara her á jørðini fær tað ljós yvir sær, tað meining, sum tað eigur. Man kemur, at síggja tað heila í einum størri perspektivi. Tað æviga lívið er nakað vit eisini her kunnu gleða okkum til. Ikki soleiðis, at vit ynskja okkum úr hesum heiminum, tí vit mugu altíð minnast til, at Jesus hevur sett okkum til at liva og gera okkara besta her á jørðini, men lív okkara fær ein heilt annan dám yvir sær, um vit taka ævigheitsperspektivið við. Tí tá verður ta týdningarmesta í lívinum ikki gull og góðs, men Jesus og ríki hansara. Tá fara vit ikki at lata arbeiði, fríðtíð, ríkidømi ella hvat tað kann vera standa í vegin millum okkum og Jesus. Og tá verður tað týdningarmesta í lívinum at kenna Jesus, at liva saman við Jesus í gerandisdegnum, tí tað er jú honum vit skulu liva saman við í ævinleikanum.

“Guð, tú hevur skapt okkum til tín, og hjarta okkara er ótrygt og óttafult, inntil tað finnur hvílu í tær”.

Ann Dahl Hansen

# Tí at tit eru ein roykur, sum eina stutta stund er sjónligur og so hvørvur burtur. Ják.4,14

Tað er ein royndur lutur, at tey kristnu flýggja frá hesum orði, á sama hátt sum ikki-kristin gera tað. Fyri tann vantrúna er heimurin alt. Hann fær aldri nóg mikið av heiminum. Tráanin er ósløkkjandi. Hann ræður ikki í sínum egna lívi.

Lívið kann samanberast við ein royk. Vit síggja hann stutta stund, so er hann burtur, og eingin hugsar meiri um hann.

Skalt tú hava fatur í onkrum, sum er fast og heldur, má tað vera okkurt uttan fyri ein sjálvan. Men er tað til?

Á einum staðið. Tað er ein Guð í Himlinum. Hann hevur alt vald. Tað umfatar eisini títt lív.

Tað, sum hevur týdning, er ikki, hvat tú vilt, men hvat hann vil! Tað eru trý orð, tú mást fáa inn í títt sinn. Tað eru orðini: Um Guð vil!

Tann natúrliga menniskjan upplivir, at orðini eyðmýkja. Menniskjan vil sjálv ráða. Fyri ta nýggju menniskjuna eru orðini ein lætti.

Tá tú biður Faðir vár, leggur tú hvønn dag í Guðs hond, tá tú sigur: Verið vilji tín, sum á himni so á jørð.

So er ábyrgdin ikki longur tín. Hon er løgd yvir á hann, sum í øllum og ígjøgnum alt hevur frelsu tína fyri eygað.

H.E. Nissen: Han er vor fred

Sólvá Syderbø



# At liva í óvissu. Joh. 10, 24-26.

"Hvussu leingi vilt tú halda sál okkara í óvissu?" søgdu Jødarnir við Jesus. "Ert tú Kristus, tá sig okkum tað beint fram!" Hetta kom sum eitt neyðarróp. Men tað var ikki Jesus, sum helt sál teirra í óvissu, men tað var teirra egna vantrúgv. Eg havi sagt tykkum tað, og tit trúgva ikki," segði Jesus.

Nógv menniskju ganga við einari óvissu í sínari sál. Um so er, at Gud er til, hví sigur hann tað ikki beint fram? Hvussu kann ein kærleiksfullur Gud lata alt hetta ganga um seg, sum fer fram í heiminum í dag? Tað hevur ongantíð í søguni sæð so myrkt út fyri menniskjunum sum í dag. Hví grípur hann ikki inn? Hvussu leingi vil hann halda sál okkara í øvissu?

Men tey eru ikki greið yvir, at tað er ikki Gud, men tað er teirra egna vantrúgv, sum heldur sál teirra í óvissu. Men tit trúgva ikki, tí at tit eru ikki av mínum seyðum. Hvat meinar Jesus við, tá ið hann sigur, at tit eru ikki av mínum seyðum? Tá ið Jesus sigur, at teir ikki vóru hansara seyðir, so vil hann eisini siga, at teir høvdu ikki hann til hirða, og tá ið teir ikki høvdu hann til hirða, so mátti tað vera djevulin, sum teir høvdu til hirða. Tað framgongur eisini av tí, sum hann sigur hjá Jóh. 8, 44: Tit hava djevulin til faðirs, og tað, sum faðir tykkara lystir, vilja tit gera. hann var manndrápari frá upphavi og stendur ikki í sannleikanum, tí at sannleiki er ikki í honum; tá ið hann talar lygn, talar hann av sinum egna, tí at hann er lygnari og faðir at lygnini."

Tað vísir seg soleiðis, at menniskjuni hava altíð lættari við at trúgva lygnini enn sannleikanum. Tað kemur oftani illa við hjá menniskjum at hoyra sannleikan. Men tá ið onkur fortelur eina lygn, tá spíla menniskjuni oyruni út. Men Jesus sigur, at faðirin at lygnini er djevulin, og trúgva menniskjur

lygnini, so trúgva tey á djevulin.

Vit hoyra í Guds orði um ein ríkan mann og Lázarus; hin ríki glataðist, meðan Lázarus kom í himmalin.
Men at ríkmaðurin glataðist, var ikki tí, at hann var ríkur, men tað var tí, at sálin var í óvissu, hann var vantrúgvandi. Og tað, at Lázarus kom í himmalin, var ikki tí, at hann var fátækur, men tí, at hann hevði fingið vissu í sina sál, hann var trúgvandi.
Rikimaður, hann livdi í fagnaði og góðgæti, meðan Lázarus tráaði eftir at mettast av molunum, sum fullu av borðinum hjá hinum ríka. Men Gud greip inn. Tann sami Gud, sum menniskjur siga um: "Hví gripur hann ikki inn?" Tí tey trúgva ikki. Tey síggja einki, tí tey eru blind, og tey hoyra einki, tí tey eru deyv.
Jesus sigur hjá Matt. 13,15: "Tí at hjartað á hesum fólki er vorðið deyvt, og við oyrunum hoyra tey tungliga, og eygu síni hava tey latið aftur, til tess at tey ikki mega síggja við eygunum og hoyra við oyrunum og skilja við hjartanum, og venda um, so at eg kundi fingið grøtt tey."
Tað stendur eisini í Guds orði um ein ríkan bónda, sum segði við sál sina: “slá teg nú til tols." Men tað besta dømi um tað, at sálin var í óvissu, tað var tað, at hann segði við sál sina: "slá teg nú til tols." Men nevniliga tá ið hann trúði, at tað stóð væl til, tá greip Gud inn. "1 nátt skal sál tin krevjast av tær." Eitt menniskja kann vera so ríkt, sum tað vera vil, av hesum heimsins góðsi, men eigur tað ikki trúnna á Jesus í sinum hjarta, so kann tað, so ofta sum tað vil, siga við sál sina: "slá teg nú til tols." Men tað blivu við at vera tað eymasta menniskja, sum nakrantíð hevur livað á foldum.
Dávid sigur: "Hin gudleysi eigur ongan frið, men tann, sum litur á Harran, letur hann náði sina vera rundan um.

Jødarnir royndu at teppa Jesus og royndu at gera hann til einkis. Men tað var sum, at tað var so ringt, at gera seg leysan av hønum. Men teir sóu, at tað bar ikki til, sálin hevði ongan frið. og so kom neyðarrópið: "Hvussu leingi vilt tú halda sál okkara í øvissu? Ert tú Kristus, tá sig okkum tað beint fram!" Men Jesus segði: "Eg havi sagt tykkum tað, og tit trúgva ikki."
Hvussu nógv menniskju ganga ikki við einari óvissu í sínari sál. Tey royna at siga við sál sina: "Slá teg nú tols." Men tey eiga ongan frið. Og tey hava hug at rópa hetta sama sum jødarnir: "Hvussu leingi vilt tú halda sál okkara í óvissu." Men tað er ikki Gud, sum heldur sálina í óvissu, men tað er menniskjans vantrúgv.
Menniskjuni royna at billa sær sjálvum inn, at tað er ikki soleiðis, sum tað stendur í Guds orði. Eingin Gud
kann vera so harður at steingja menniskjur úti frá Guds riki. Og tí kunnu tey ongantíð fáa vissu í sina sál.
Hjá Jóh. 12, 48 stendur soleiðis: "Tann, sum vanvirðir meg og ikki tekur við orðum minum, hevur tann, sum dømir hann: orðið, sum eg havi talað, tað skal døma hann á evsta degi."
Tá ið vit hoyrdu at Oluf Palme var dripin, Tá stóðu vit spyrjandi, hvussu kann slíkt henda.
Men Jesus segði við jødarnar: Tit hava djevulin til faðirs, og tað, sum faðir tykkara lystir, vilja tit gera. Hann var manndrápari frá upphavi.
Jødarnir søgdu at teir høvdu Gud til faðir, men Jesus segði at teir høvdu djevulin til faðir.
Jesus segði við teir jødar , sum høvdu tikið við trúgv á hann: "Um tit vera verandi í orði minum, tá eru tit av sonnum lærusveinar mínir, og tit skulu læra at kenna sannleikan, og sannleikin skal fría tykkum.
Um tí sonurin fríár tykkum, tá skulu tit verða av sonnum frælsir.

Martin Thomsen

# Lucac Cranach

Ferðaleiðarin, sum vísti okkum runt í luthersku kirkjuni í Weimar í Týsklandi, helt at Cranach hevði verið meira djarvur, enn gott var. Hann hevði sett, bæði seg sjálvan og Martin Luther, mitt í myndina av altartalvuni, hann hevði málað. Ferðaleiðarin, sum var uppvaksin og upplærd í tí fyrrverandi Eysturtýsklandi (DDR) hevði helst ikki fingið nágreiniligt innlit í luthersku trúarlæruna. Tí skilti hon heldur ikki at sjálvsmyndin á altartalvuni, var ein persónligur vitnisburður og at málarin, ikki var úti eftir at lýsa seg sjálvan.
Lucas Granach eldri (1472 – 1553), var ein sera kendur og fjølbroyttur málari. Hann tók við luthersku læruni og bleiv góður vinur við Luther. Hann hevði málað andlitsmyndir av Luther, Melanckton og fleiri. Tann stóra altartalvan í Weimar, var ikki rættiliga liðug, tá ið hann doyði. Sonur hansara Lucas Granach yngri, gjørdi hana lidna. Hann bleiv ein kendur málari.
Lucas Granach eldri, var djarvur, men á ein heilt annan hátt, enn ferðaleiðarin helt. Hann nýtti veruliga altartalvuna, til at bera fram ein persónligan vitnisburð um, hvussu hann sjálvur var vorðin ein kristin.
Kjarnin í málninginum er Jesus á krossinum. Tað er onki ivamál. Undir krossinum standa tríggir menn. Í miðini, stendur Lucas Granach sjálvur. Honum við lið, standa Luther og Jóhannes doyparin. Luther stendur við einari opnari bíbliu. Hyggja vit nærri, síggja vit at hon er sligin upp á Joh. 3. 14 -15. ”Og eins Móses hevjaði upp ormin í oyðimørkini, soleiðis eigur menniskjusonurin at verða upphevjaður, til tess at ein og hvør, sum trýr, skal hava ævigt lív í honum.” Luther peikar niður á bíbliuna og vit skilja, at hann talar um, hví Jesus hekk á krossinum.
Eisini Jóhannes doyparin peikar og prædikar. Hann vendir sær máti Grannach, meðan hann við aðrari hondini peikar á Jesus uppi á krossinum. Við hinari hondini, peikar hann á eitt lamb, sum stendur við føtur hansara. Vit skilja at doyparin talar um tað, sum stendur í Jóh. 1. 29.
”Sí Guds lambið, sum ber synd heimsins.”
Men so koma vit til tað, sum ger málningin til ein persónligan vitnisburð. Úr sárinum í Jesu síðu, rennur ein blóðstrála niður á høvur Cranacks. Hvat er tað, sum málarin vil siga við hesum?
Eg haldi, hann vil siga okkum, hvussu hann sjálvur kom til trúgv á Jesus. Tað hendi, tíð hann hoyrdi um Jesus á krossinum. At Jesu blóð rann, fyri at hann Lucas Crannach, skuldi blíva frelstur.
Á hendan einfalda hátt boðar Crannach – 450 ár aftaná deyða sín – framvegis gleðiboðskapin fyri okkum. Tað er, tá ið boðskapurin, um hví Jesus hekk á krossinum, verður boðaður, at trúgvin kemur.
”So kemur tá trúgvin av tí sum verður hoyrt, men tað sum verður hoyrt, kemur gøgnum orð Krists (Róm. 10,17)”
Jesus sigur: ”Eg eri alfa og Omega, byrjanin og endin.” Tað er orðið um Jesus sum skapar trúnna.
Eg vóni, at kirkjan í Weimar, skjótt fær ein ferðaleiðara, sum skilir boðskapin í myndini og á tann hátt kann bera hann víðari, til frelsu og signing fyri mong.

Asbjørn Nordgaard
Lea Juul umsetti

Fællesbrev nr. 123 Arusha
11/9 2015

# Brug det gunstige øjeblik, for dagene er onde

Min computer var kørt træt, meget træt, den trængte til at komme på computernes hvilehjem. En ny blev anskaffet gennem LM's computermand, og han havde sikret, at ikke alle og enhver kunne tænde for computeren og bruge den, en adgangskode var nødvendig. Han havde besluttet, at hver eneste gang jeg tænder for computeren eller skal vække den op af dvale, skal jeg skrive Efes 5.16 (så ved I det), og i Efes 5.16 står der: "Brug det gunstige øjeblik, for dagene er onde. "

**Det gunstige øjeblik**

Det **gunstige øjeblik er nu**, og derfor er vi som familie spredt ud over verden. Thomas med familie er i **Danmark,** og kæmper for at sprede god teologisk litteratur. Lina er på mission i **Israel** sammen med tre andre unge og kan følges på denne adresse: glimtistoevet.wordpress.com/. Silas med familie er i et **T-land** og vi er selv i et andet T-land - **Tanzania**.

Det er nu **et gunstigt øjeblik** for kristent litteratur i Tanzania. På forlagssiden har vi haft vores første møde i litteraturudvalget. Det fandt sted i Dar es Salaam. I udvalget sidder Philip Bach-Svendsen fra Danmark, to tanzaniere, en kenyaner og så forlagslederen. De nye skulle have indblik i Soma Biblia's historie og nuværende arbejde. Tanker om udfordringerne i dagens Øst-Afrika skulle frem i lyset. Hvilke temaer skulle tages op i vores bøger og hvilke bøger var der brug for at arbejde med lige nu? Nogle af tankerne gik på, at der var brug for vejledning i forhold til den teologi, aktuelle fjernsynsprædikanter lagde for dagen. Der var brug for vejledning omkring nådegaver. Vejledning omkring kristnes forhold til politik. Det var vigtigt, at vi tog alvorligt, hvad folk sloges med og de tvivlsspørgsmål, de kunne bære på, og gav god vejledning. Der var også brug for god vejleding i at tjene Gud 'i kald og stand', dvs. i det daglige liv. Osv. Ud af disse tanker kommer der uden tvivl til at vokse nogle bogprojekter. Mødet sluttede med en overbliksgennemgang af de projekter, der aktuelt arbejdes på.

Efter nogenlunde at have fået sorteret, systematiseret og lagt forlagsarbejdet i forskellige kasser, kan vi konstatere, at vi arbejder på en eller anden led med 28 aktuelle bogprojekter, hvoraf de fleste uden tvivl vil blive til noget. Det handler både om genoptryk (hvilket er et ret stort arbejde for flere af dem), nye bøger, der er taget beslutning om, og bøger der er under overvejelse. Ud over bogprojekter har vi lige færdiggjort et nyt nummer af Twende (børnebladet), der har fået en god støtte fra en menighed i Danmark, så der er mulighed for at sprede det videre ud også til dem, hvor det kniber med midler til at købe det for. I skrivende stund er vi også ved at lægge sidste hånd på et nyt nummer af bladet for præster og evangelister, Riziki, der denne gang handler om bøn. Det skulle gerne ud inden valget i Tanzania d. 25/10.

Philip Bach-Svendsen er ansat 50 % i Soma Biblia med bopæl i Danmark, men er i Tanzania en måned hvert år. Vi havde fornøjelsen af at have Philip boende de første

10 dage, før turen gik til Dar til møde. Så vi fik noget fra hånden i de dage.

**Dagene er onde**. Sådan opleves det i forbindelse med valget på Færøerne. Der var engang, der blev spurgt: Hvad blev det? Indforstået: En pige eller en dreng. Køn var givet, og var der nogle, der havde problemer med deres kønsidentitet, så skulle de vejledes, støttes og hjælpes. I dag vil nogle, at vi skal svigte mennesker og gøre spørgsmålet om køn til menneskets eget valg. Hvilken forvirring og hvilket mørke - ikke blot for de børn, der vokser op nu - men for hele menneskeheden. Skabningens oprør imod sin Skaber. Den lutherske Kirke i Tanzania (eller dele af den) har i år udgivet et jubilæums- og kampskrift i anledning af, at det er 25 år siden, at de første kvinder blev ordineret. Hvorfor? Fordi der ikke må være forskel mellem mand og kvinde, siger man med henvisning til Gal. 3,28. Først bliver det kønsløst, siden gøres køn til et valg… Man er heller ikke bleg for at gå ud i pressen for at forsøge at vride armen på de sidste lutherske stifter, der endnu ikke har bøjet sig for tidsånden (The Arusha Times, August 22-29, 2015). Og så kan den enkelte jo fortsætte rækken af begivenheder, der gør, at dagene er onde…

**Det gunstige øjeblik**

Vores kok på kompounden har lige skrevet **en hilsen til børnene fra en, der engang var et barn.** Det er en hilsen til børnene, der læser børnebladet Twende. Hun fortæller, hvordan hun voksede op i en hedensk familie, og hvordan lørdag og søndag var dage, hvor der skulle arbejdes i marken. Men hun og hendes søster arbejdede hårdt, så de hen mod aften kunne gemme hakkerne og i al hemmelighed liste sig hen for at få dåbsundervisning. Hun blev døbt, da hun gik i femte klasse i 1985. Da faderen senere fik det at vide, accepterede han, at de blev kaldt ved deres dåbsnavne. I 2013 blev faderen syg og ville da bo hos sin kristne datter, for nu ønskede han ikke blot lægelig behandling men også forbøn. I dag er faderen kristen og lever nu kun sammen med sin første hustru. Han havde tre. Vores kok brugte **det gunstige øjeblik** og vidnede for sin far. En dag bar ordet frugt i hans liv. Lad os bruge **det gunstige øjeblik.**

Kærlig hilsen

og Guds fred

Anne-Lene og Peter

PS: For dem der har lyst vedhæfter vi lige nogle Moshi-oplevelser














**Moshi**

Vi befinder os ikke så langt fra foden af Kilimanjaro. Vi har begge to været her før – hver for sig – denne gang sammen. Men det tog lige den mandlige del af firmaet 5 dage i Moshi – 3 dage i denne omgang, før tågen lettede og det blev muligt at se bjerget med sneen. Jeg kunne selvfølgelig godt have benægtet, at bjerget fandtes, da det efter fire dage endnu ikke var dukket op… Men vidnesbyrdene om bjergets eksistens var stærke, og en gang imellem handler det om at leve i tro, ikke i skuen.

Jo, det var flot endelig at få lov til at se det sneklædte bjerg i Tanzania. Og endnu flottere bliver det at se den nye jord. Det vidnesbyrd – vidnesbyrdet om en ny jord – står trods alt langt stærkere end de vidnesbyrd om Kilimanjaros eksistens, jeg i fire dage havde klynget mig til.

Første gang jeg var i Moshi d. 19-20/7 overnattede jeg på det lutherske Uhuru hotel (frihedshotel) på vej til Mwika, hvor jeg skulle forhandle korrekturlæsning af Carl Fr. Wisløff's bog om Luthers teologi med professor Godson S. Maanga. 40.000 shilling for et værelse med bad og toilet og inklusiv morgenmad (sådan ca. 140 kr). Anden gang d. 20-24/8 fik vi et dobbeltværelse på YMCA for 20.000 shilling inklusiv morgenmad med bad og toilet på gangen. Vedligeholdelsesstandarden var klart bedst på det lutherske sted, men ellers var maden på YMCA glimrende og så var der 25 m svømmebassin og en smuk udsigt til Kilimanjaro. Hvordan udsigten er fra det lutherske sted mod Kilimanjaro, har jeg endnu til gode.

Første gang blev det til en tur på den lokale kirkegård inklusiv krigskirkegården. På vejen dertil var der en kirkebygning, der påkaldte sig opmærksomhed. Den virkede solidt bygget og lidt utraditionel for en baptistkirke at være. Den var da også oprindelig en græsk-ortodoks kirke, som baptistmenigheden havde købt, men trods deres reformerte tradition havde de ikke malet billederne i loftet over og billederne i korvæggen var blot dækket over med stof. Kirken var lukket, men præsten boede lige ved siden af og Anita, præsten smukke datter, uddannet laborant, ugift og ingen kæreste (men en gudfrygtig kæreste måtte jeg meget gerne bede om, at hun fik, og vær så god at bede med her) lukkede kirken op og viste mig rundt.

På kirkegården var der også flere græske grave, som jeg også har stødt på i Dar es Salaam på den gamle tyske kirkegård ved siden af krigskirkegården og i Iringa på selve krigskirkegården. I Iringa er der også en græsk-ortodoks kirke og et par nye er bygget uden for Iringa på vej mod Mbeya.

I Moshi, som i resten af Tanzania, findes der et utal af kirkesamfund. Muslimer er også et kendt billede i hverdagen. Men i Moshi var der også et stort reklameskilt for Scientology (Dianetik), uden at jeg fik undersøgt, om det stadig var en "kirke" med aktiviteter i Moshi. Ikke så langt fra KFUM lå frimurernes bygning og ved indgangsdøren til KFUM var der et skilt, der bekendtgjorde, at hver onsdag aften holdt den teosofiske forening møde på stedet. Og lige inden for hoveddøren afslørede en mindeplade, at det var kristne, muslimer og hinduer, der i 1959 startede den kristne forening KFUM… Hvor meget foreningsaktivitet der er, fik vi ikke indblik i. Medlemmerne kunne komme og købe en kop te eller kaffe, øl eller sodavand og mad. En enkelt bryllupsfest blev afholdt, mens vi var der, og så var det selvfølgelig en udfordring at skulle sove… En række sygeplejersker var på en måneds kursus på stedet, fortalt en venlig sygeplejerske fra Pemba. De sov dog ikke på stedet.

I Moshi er der en stor katolsk katedral og en relativ stor luthersk katedral. Begge steder var der rimeligt store bogbutikker.

Engang kørte toget… Jernbanestationen, skinner, vogne, mv. var der stadig, men toget kørte ikke længere og havde ikke kørt siden…. Moshi er også en by for turister, så Anne-Lene fik et maleri med hjem med en cyklende dame med børn; en høne i den karakteristiske blå plasticpose på bagagebæret og Kilimanjaro i baggrunden.

Det bliver nok ikke sidste gang, vi smutter en tur til Moshi.

Peter O.K. Olofson

# Menniskjuni handan prestarnar

Kai Johansen

Eftir fýra mánaðum havi eg hitt næstan 40 norskar pastorar í mínum nýggja arbeiði sum samskipari fyri meinigheitirnar í Troens Bevis. Vit fingu okkum kaffi ella morgunmat, meðan vit tosaðu um missión, men kanska mest um lív og tænastu. Tey eru ung og eldri, nýggj í starvinum og roynd í leikum, menn og kvinnur, úr smáum, miðalstórum og stórum meinigheitum, úr bygd og býi um alt landið. Hetta hava verið góðar og ærligar samrøður við bæði látri og tárum. Summi eru bjartskygd, onnur kenna seg útslitin. Summi hava lært seg at liva gjøgnum tíðir, har stígur er komin í, og tey møta ábreiðslum, onnur uppliva einleika og framgongd. Tey eru líka ymisk sum tú og eg, men øll hava tey eitt til felags:

Tey eru vanlig menniskju, sum hava eitt kall frá Gudi.

At tey eru vanlig, vita vit sjálvandi, tá ið vit hugsa okkum um, men tað kann tykjast, sum tað er lætt at hugsa, at ein pastorur fær eitt slag av einum "superhetju-búna", sum ger, at tey automatiskt tola meir enn vit onnur deyðiligu. Tískil eiga tey at tola útspilling, svik, vánalig fíggjarviðurskifti, familjutrupulleikar og aðrar avbjóðingar, sum lívið bjóðar, betri enn vit onnur. Tað er lætt at hugsa, at ein prestur er ein, sum kann hjálpa og stuðla mær, og sum sjálvur ikki hevur brúk fyri so nógvari hjálp.

Men hetta man ikki vera heilt tað, sum Bíblian sigur?

Leiðarar í meinigheitini, sum duga væl at stýra, eru verdir bæði virðing og løn í pengum. Hetta er serliga galdandi tey, sum arbeiða hart við at breiða út boðskapin um Jesus og undirvísa í meinigheitini. Gud hevur sagt í Skriftini: "Tú skalt ikki múlabinda oksan, tá ið hann treskir," og "arbeiðsmaðurin er løn sína verdur." -"Tak ikki við kærumáli móti einum elsta (t.e. leiðara), uttan at tveir ella tríggir eru vitni." (1. Tim. 5,17-19)

Her síggja vit, at Bíblian sanniliga mælir okkum til at geva okkara leiðarum virðing, stuðul og verju. Hví er tað so? Jú, tí meinigheitin stendur í einum andaligum bardaga at boða evangeliið, og har bera leiðararnir størstu ábyrgdina. Um vit stríðast innanhýsis, missa vit styrkina og einleikan at fullføra missiónsuppgávuna, og tí mælir Bíblian okkum til at stuðla og biðja fyri andaligum leiðarum.

Men um nú leiðararnir misnýta sína makt? Hesin spurningur er sjálvandi týðandi, men hann kann eisini gera, at evnið fer av sporinum, sum er at "lyfta armarnar" hjá leiðarunum, júst sum Áron og Hur gjørdu við Móses. Um ein lærari ella lækni misnýta sítt starv, so er tað eingin, sum tekur til orðanna at mótarbeiða øllum lærarum og læknum? Sjálvandi mugu leiðbeinandi reglur til fyri at handfara trupulleikar, sum stinga seg upp, men høvuðsevnið hjá mær í

dag er einfalt: Vilt tú biðja fyri presti tínum hvønn dag?

Vilt tú biðja, sum var tað tú, sum bert ábyrgdina, tey bera? Vilt tú fjala út yvir teirra veikleikar við kærleika og stuðla og stimbra tey líka nógv, sum tú sjálv vildi ynskt, at onnur gjørdu móti tær?

Tey eru heilt vanlig menniskju við brekum og lýtum, men sum Gud hevur kallað, og sum tú og eg kunnu hjálpa gjøgnum forbøn:

"Við tað at tit eisini koma okkum til hjálpar við bønini fyri okkum, fyri at tað av mongum munnum má verða framborin tøkk okkara vegna." (2. Kor. 1,11)

Takk fyri hjálpina!

Effie Campbell umsetti.

# Ansið eftir vatnsmakkinum

Tíðarandin hevur tað við sær, at millum menniskju - eisini millum trúgvandi menniskju - er lyndi til at undirgrava myndugleikan í Guds orði. Sterkar kreftir eru í gongd við at gera trúnna hjá menniskjum veikari viðvíkjandi tí, at Bíblian er innblást av Gudi, hóast tað stendur skilliga í Bíbliuni sjálvari: "Øll skriftin er innblást av Gudi." 2. Tim. 3,16.

Tey, sum bera orðið fram, hava eina stóra ábyrgd. Har, sum fyrr ljóðaði eitt: "... so sigur Harrin," hoyrist ofta nú eitt: "... kanska, kann vera, eg veit ikki, hatta er ikki meint so álvarsligt, tað skal ikki skiljast beint, sum tað er sagt," o.s.fr. Tey, sum áttu at verið verjar hjá orðinum, eru vorðin orðsins ákærarar. Tey sáa mistreysti við orðum sínum. Óvissan og líkasælan yvir fyri Guds orði breiðir seg innan tey kristnu. Við at látast sum Bíblian ikki hevur guddómligan myndugleika, hava tey latið dyrnar upp fyri øðrum religiónum. Tá ið grundvøllurin ridlar, er einki fast støði, og tí er allur kristinheimurin í dag farin av allari leið.

Menniskju broyta grundreglurnar í Bíbliuni og gera tær mildari, og úrslitið verður vaksandi lógloysi og líkasæla. Menniskju ynskja eina kirkju, sum nokk skal standa til tænastu fyri tí nýmótans menniskjanum; men hon skal helst ikki koma sær upp í gerandisdagin hjá tí. Menniskju tráa eftir einum boðskapi, sum kann bjóða syndafyrigeving uttan angur, trúgv uttan gerningar og frælsi uttan ábyrgd. Tey vilja ikki vera bundin av Guds orði.

Jesus hevur sagt, at tey, sum hava tikið ímóti honum, skulu vera salt jarðarinnar. Saltið skal

seta smakk á og verja ímóti spillu. Ansið tí eftir vatnsmakkinum! Tað saltið, sum er dovnað, verður blakað út og traðkað undir mannafótum. Vit eru eisini ljós heimsins, hjartað er fult av, veitst tú. Ver ikki bangin at ganga nøkrum ov nær ella traðka tey á tærnar. Jesus gevur tær hetta ráðið, hvussu tú eisini kanst vitna í gerandisdegi tínum: "Soleiðis lýsi ljós tykkara fyri fólki, at tey mega síggja góðgerðir tykkara og æra faðir tykkara, sum er á himni." Matt. 5,16.

Røddir eru frammi í dag, sum siga, at tað skal ikki skrivast forkynnandi; tað løgnasta er, at tey ikki seta somu krøv til sín sjálvs. Jesus ávarar okkum og sigur: "Síggj tí til at ikki tað ljósið, sum er í tær, er myrkur," og hann eggjar okkum at fara til verka: "Farið tit tí út á vegamótini og bjóðið so mongum, sum tit sigur Jesus víðari, tí mást tú ikki lata tað vera nakað loyndarmál, at tú ert trúgvandi. Muður mælir tað, sum

hitta," (Matt. 22,9) og "Bjarga teimum, sum leidd verða til deyða, og halt teimum aftur, sum fara vinglandi á rættarstaðin." Orð. 24,11.

Tað man ikki vara leingi, fyrr enn Jesus kemur. Hvat fara vit tá at svara honum? Nei álvaratos, vit mugu ikki ganga okkara egnu leiðir. Vit mugu siga frá okkum øll sjálvgóð áhugamál og ganga meir avgjørd inn fyri Guds verki, áðrenn alt, sum eitur tíð, er at enda komið.

***Effie Campbell umsetti.***



# Trúgvur í tænastuni

Guðstænastan var liðug, og nú sóust tveir aðalsmenn við skundi fara rennandi niðan á slottið. Teir sóu ikki blíðir út, og mong fólk, sum hugnaðu sær úti í tí góða veðrinum, undraðust, hví hesir menninir høvdu sovorðnan skund og gittu, at okkurt álvarsamt mundi vera á vási.

Tá ið teir komu yvir til portrið, kravdu teir beinanvegin at sleppa at tosa við kongin. Boðini vórðu send víðari, men kongur hevði ikki tíð til at tosa við teir, tí hann vildi sleppa at eta døgverða í frið og náðum.

Av tí at aðalsmenninir vóru so uppøstir og søgdu seg hava eitt álvarsmál at bera konginum, sluppu teir inn um portrið, og løtu seinni vórðu teir bidnir um at koma inn í slottið. Kongurin var ikki fegin um, at hann ikki fekk matnáðir, men lovaði kortini aðalsmonnunum at koma við teirra álvarsmáli, um tað ikki kundi bíða.

Aðalsmenninir søgdu honum, at teir júst høvdu verið í kirkju, og at teir vórðu so bilsnir av prædikuni, at teir kendu tað sum, at teir máttu siga konginum frá. Teir greiddu frá, at presturin ístaðin fyri at boða Guðs orð, hevði tosað um, at tænararnir á slottinum og aðalsmenninir bara hugsaðu um at eta góðan mat, at drekka og hugna sær saman við konufólki. At teir als ikki hugsaðu um Guðs orð, men bara um at stuttleika sær.

Kongurin tyktist ikki so bilsin sum aðalsmenninir og segði seg kenna prestin. Hann visti væl av, at hann kundi vera sera bersøgin. Hann bað aðalsmenninir fara og lovaði, at hann skuldi taka sær av málinum. Aðalsmenninir fóru glaðir avstað, tí nú væntaðu teir, at kongurin fór at seta prestin upp á pláss, so at teir aldri aftur skuldu sita í kirkjuni og hoyra hann tosa so niðursetandi um kongsins menn og teir ráðandi í landinum.

Kongurin sat og hugsaði seg um í eina løtu og bað so ein tænara geva prestinum boð um møta upp á slottinum morgunin eftir klokkan tíggju. Tá ið presturin fekk boðini, sat hann og át døgverða saman við húskinum. Konuni dámdi einki, at maðurin hevði fingið boð um at koma at tosa við kongin. Hon hevði hug at ákæra hann fyri, at hann var ov harðligur í sínum prædikum, og at hann nú kundi rokna við at verða revsaður.

Presturin var ikki samdur við konuni. Segði, at tað var hansara plikt at boða Guðs orð, eisini tá ið tað snúði seg um at átala synd og ólevnað. Um hann varð revsaður fyri tað, so var einki at gera við tað, tí tað týdningarmesta fyri hann var at hava góða samvitsku.

Konan var ikki samd við honum og bað hann eisini hugsa um, at hann ikki bara hevði ábyrgd av sær sjálvum, men eisini henni og børnunum. Hvat skuldu hon og børnini liva av, um hann var settur frá? Presturin helt, at tey øll skuldu leggja alt í Guds hendur og biðja um hansara vilja. Og so legði hann konu og børnum eina við, at tey altíð máttu siga sannleikan. Kosta, hvat tað kosta vildi.

Presturin og konan svóvu ikki væl hesa náttina, tí tey vistu, at maðurin skuldi møta konginum morgunin eftir. Tey tosaðu um, hvat ið mundi vera teimum í væntu, og konan

var eisini samd við manninum í, at tað var týdningarmikið at siga sannleikan.

Klokkan tíggju morgunin eftir stóð presturin framman fyri konginum, og hann var rættiliga nervøsur. Hjartað bankaði so hart, at hann var bangin fyri, at kongurin hoyrdi tað. Kongurin vendi sær róliga ímóti honum og segði, at hann hevði hoyrt, at hann hevði hildið eina harða talu í kirkjuni.

Tí játtaði presturin, men segði seg einans at hava talað Guds orð. Kongurin spurdi, um hann hevði átalað kongsins høgu menn í taluni, og tá svaraði presturin, at Guds orð ikki gjørdi mun á høgum og lágum.

Kongurin vildi hoyra taluna, og presturin mintist hvørt orð, sum hann hevði prædikað. Hann byrjaði síðani at halda ta somu taluna aftur fyri konginum. Hann las úr ápostlasøguni í 24. kapitli um landshøvdingin Felix, sum vildi tosa við Paulus um trúgv hansara á Jesus Kristus. Hann las eisini um, at Felix ikki hevði hug at lurta, tá ið Paulus fór at tosa um rættvísi, fráhald og komandi dóm, og at hann segði seg skula kalla Paulus aftur til sín, tá ið hann hevði tíð til tað. Síðani vísti presturin á, at tað sama hendir í dag. Menniskju vilja fegin hoyra Guðs orð so leingi, sum tey ikki kenna seg rakt av orðinum, men tá ið prædikað verður um rættvísi og dóm, so hava tey ikki tíð ella hug til at lurta. Tey vilja heldur sjálvi vera harrar í teirra lívi, eisini aðalsmenn og kongsins tænarar.

Meðan presturin talaði, hugdi hann av og á at konginum, sum sá álvarsamur út. Hann hevði eina kenslu av ótta og hugsaði um konu og børn, sum ongan høvdu at forsyrgja sær, um hann varð koyrdur frá. So við og við fjarðaði henda kensla kortini burtur, og hann stóð har fríur og prædikaði eins og fyri kirkjuliðnum sunnumorgnar.

Tá ið presturin var liðugur við prædikuna, valdaði friður eina góða løtu. Tað einasta presturin hoyrdi, vóru gløðurnar frá eldstaðnum. At enda lyfti kongurin høvdið og helt fyri, at presturin so sanniliga hevði skil fyri at sveiggja svørðinum, meðan hann talaði. Presturin svaraði, at tað var Guð, sum hevði givið honum hetta svørðið. Tá segði kongurin, at hann ynskti sær ein prest við hoffið, sum dugdi at brúka svørðið frá Guði á rættan hátt, og tí ynski hann at geva prestinum hetta starvið.

Presturin gjørdist sera bilsin og tordi ikki at trúgva sínum egnu oyrum. Hetta hevði hann ikki væntað, men ístaðin at vera koyrdur úr prestastarvinum. Men hann helt seg ikki vera egnaðan til at virka við hoffið, tí hann kláraði ikki at prædika øðrvísi, enn hann gjørdi í kirkjuni. Tá svaraði kongurin, at tað júst var orsakað av hansara prædiku, at hann ynskti at hava hann við hoffið.

Tá ið presturin kom heim við tíðindunum um, at hann hevði fingið starv sum prestur á slottinum, var gleði á prestagarðinum. Kona og børn skiltu einki, men presturin fortaldi teimum, at kongur hevði sett hann í starv, tí at hann var trúgvur í tænastuni og prædikaði sannleikan, sum stóð í Bíbliuni. Síðani minti hann enn einaferð konu og børn á altíð at siga sannleikan. Kosta, hvat tað kosta vildi.

Leysliga umsett

Petra Gregersen

# Fantomsmerter

Fantomsmerter er et fænomen, hvor man har smerter i en legemsdel, som fysisk er mistet ved amputation eller ulykke. Smerten forekommer som følge af processer i de smerteførende nerveceller i rygmarven. Smerten kommer altså ikke fra legemsdelen selv, men en indbildt smerte forårsaget af smertemeldinger i nervesystemet. Man kan således kun få fantomsmerter, hvis legemsdelen har eksisteret.

Hvis du har arme og ben i behold, lider du nok ikke under fysiske fantomsmerter, men kender du til åndelige fantomsmerter? Det gør jeg i al fald. Med åndelige fantomsmerter mener jeg smerten over gammel synd og dumme fejltagelsen, som man har angret og bedt om tilgivelse for tonsvis af gange. Disse smerter kan plage, så man er ved at miste modet og har svært ved at kalde sig kristen.

Jeg ved godt, at Jesus tog al synd på sig, da han døde på korset i mit sted. Men synden plager mig alligevel, og min indre stemme siger, at jeg ikke er god nok. Denne indre stemme kommer ikke fra Gud, men fra hans modstander, som elsker at anklage os og gøre os mismodige. Hvad skal vi gøre, når vi har det sådan? Det siges, at Luther engang kastede et blækhus efter Satan, da han kom og anklagede ham. Den metode vil jeg umiddelbart anbefale, men jeg har erfaret, at bøn og lovsang kan være en god hjælp. En anden stor hjælp kan være at bekende sin synd for en sjælesørger og modtage syndernes forladelse. Vi kan godt blive tilgivet, når vi beder om det i enrum, men nogle gange kan det være en god forebyggelse at fantomsmerter, at høre tilgivelsens ord fra en medkristens mund.

Anne Lene Olofson

Útgevari
Kirkjuliga Missiónsfelagið
Purkugerði 7
Fo- 100 Tórshavn
t- postur: kmf@kmf.fo

Heimasíða: www.kmf.fo
Ábyrgd: Kristian Thorleifsson
tel: 212856
Prent: KMF
Konta: 9181- 495.337.3

Kirkjuligt Missiónsblað
kemur út 8 ferðir um árið
(februar, mars, mei, juni, august
september, november og desember
Haldaragjald: kr. 200,00